## Vegleiðing um útbúgvingar

Hósdagin 27. september verður góður møguleiki at fáa vegleiðing um útbúgvingar, tá sokallaða Markleys Útbúgving 2007/2008 verður hildið. Talan er um eitt afturvendandi tiltak fyri elstu flokkarnar í miðnámsskúlunum, sum verður hildið umborð á Smyrli um møguleikar í sambandi við útbúgvingar bæði í Føroyum, Danmark og fleiri øðrum londum. Um kvøldið verður so sama tiltak á Handilsskúlanum í Havn, og tá eru øll sum hava áhuga fyri útbúgving hjartaliga vælkomin, siga fyrireikararnir.



## Fær nýggja ísmaskinu

Hvalbiartrolarin Steintór hevur verið í Hirtshals tær seinastu vikurnar, tí skipasmiðjan har hevði lægsta tilboðið upp á tað arbeiðið, sum skal gerast við skipið. Tað mesta er ymiskt stálarbeiði, men Steintór skal eisini hava nýggja ísmaskinu. Higartil hevur skipið havt eina maskinu, sum gjørdi vanligan ís, men tann nýggja ger sokallaðan flow-ís, skrivar Suðurrás. Samstundis sum lastin fær køliskipan. Steintór kemur aftur til Føroya um 14 dagar.

# Edmund við løgmann: Lat tingi

**-Løgmaður skal halda fingrarnar vekk og Marius Dam sleppur ikki at forhála málið um Føroyar sum eitt valdømi. Tað verður koyrt ígjøgnum tingið sum øll onnur mál og ikki sum samgongumál sigur Edmund Joensen, tingformaður**

ÓSEMJA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Edmund Joensen, tingformaður ætlar sær ikki at rætta seg eftir formanninum í Rættarnevndini, sambandstingmanninum Marius Dam, sum við útvarpið í vikuskiftinum rør framundir, at málið um Føroyar sum eitt valdømi skal kannast fyrst ella sum tingformaðurin skilur hann – forhálast, soleiðis at tað ikki kemur ígjøgnum í hesi tingsetuni. -Tað kemur ikki uppá tal sigur Edmund Joensen og vísir hann harvið aftur, at hetta uppskotið fer at fáa aðra viðferð og viðgerð enn onnur mál, sum verða løgd fyri tingið.

Í farnu viku segði Edmund Joensen í samrøðu við Sosialin, at ætlaðu tingmenn sær at forhála málið, so sluppu teir ikki tað. Málið fór at fáa somu viðgerð sum onnur tingmál. Og hesi orðini stendur tingformaðurin rimmar fast við. Eisini vísti hann á, at hetta ikki er eitt mál av slíkum slag, at tað nýtist øðrvísi og eyka við-gerð enn onnur mál. – Marius Dam vil forpurra hetta málið, men tað sleppur hann ikki. Málið fer at fáa eina vanliga viðgerð sum øll onnur tingmál endurtekur tingformaður avgjørdur.

-Hvør er betri til at viðgera karmarnar rundan um demokratiið enn tingið sjálvt spyr hann og leggur aftrat: Púra frítt av øllum samgongum og bindingum. Vit hava einki annað organ, sum kann gera hetta enn løgtingið.

### Stendur fast

Hóast ábreiðslurnar skola niður yvir tingformannin í hesum døgum, har hann verður skuldsettur fyri at vera ódemokratiskur og seta kílar í samgonguna, so er tingformaðurin ikki til at vika. –Eg havi breiðan rygg, og eg ætli, at hetta málið skal koyrast ígjøgnum uttan mun til, hvat samgongumenn ella onnur siga.

*-Men er ikki talan um hastverk frá tíni síðu?*

-Tað er beint tvørturímóti. Tosað hevur verið um hetta málið tey seinastu 20 árini. Tað hava verið uppskot frammi um hetta. Eg havi tosað við allar flokkar á tingi og fingið tey signal, at tað er í lagi at eg leggi hetta fram, tí flokkarnir fáa sum so ikki gjørt tað. Eg havi eisini avstemmað hetta við løgmann og landsstýrismannin, sum hevur málið um hendi. So eg havi einki útistandandi í hesum máli. At so persónar sum Marius Dam og aðrir vilja sabotera tað við øllum midlum, tað fái eg ikki gjørt annað við enn at halda fast við mítt. Tingviðgerðina sleppa teir ikki at sabotera. Eg havi átikið mær hesa ábyrgd, tí eg skal vera tann neutrali løgtingsformaðurin, sum skal arbeiða fyri alt tingið. Serliga tá vit tosa um sjálva skipanina fyri tingið, so er tað so upplagt, at eg leggi hetta fram.

### Ikki samgongumál

-Men nú hetta kemur so tvørt fyri í samgonguni, er tú so ikki við til at seta ein kíla inn í eina samgongu tú er partur av?

-Tað er júst ætlanin, at hetta skal ikki vera eitt samgongumál. Tað skal vera eitt mál fyri tingið. Men nú eru tað samgongumenn, sum vilja hála tað inn í samgonguna og gera tað til eitt problem.

Edmund Joensen vísir á, at løgmaður og leiðarin fyri samgonguna hevur sjálvur tikið málið upp og harvið gjørt tað til eitt samgongumál. Sjálvur bað hann løgmann lata vera.



-Har ger hann eitt stórt mistak. Tí hann eigur at lata tingið arbeiða við málinum. Tað er tingið, sum hevur lagt tað fram, og tað er tingið, sum eigur at viðgera tað. Løgmaður eigur ikki at draga tað inn í samgonguna. Hann eigur heldur at loysar teir trupulleikar, sum samgongan hevur, og tað er ríkiligt av teimum.

*-Sigur tú harvið at løgmaður hevur eingi mál loyst?*

-Hann hevur nógv stórmál eftir at loysa. Henda samgongan hevur loyst góð mál, eitt nú hava vit ruddað upp í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Vit hava eisini fingið gjørt nógv gott í samfelagnum. Men tað eru nógv stórmál fyri framman.

-Men legði løgmaður seg ikki út í málið, so varð jú møguleiki fyri, at samgongumenn løgdu fram uppskot um nýval, og so datt títt uppskot á gólvið og møguleikin at loysa stórmálini tú nevnir. Skilur tú so ikki løgmann, at hann vildi forða fyri ein-um nývali?

-Teir hótta við nývali. Teir vilja brúka allar midlar, og so leingi onkur hopar undan, og teir síggja, at tað hjálpir, so blíva teir við.

Edmund Joensen heldur ikki vandi er fyri nývali, tí 19 tingmenn hava sagt frá, at teir fara at atkvøða fyri uppskotinum um Føroyar sum eitt valdømi. Tí fara